# Vit hava skyldu at traðka til, tá frælsið hjá øðrum er skert

JOHN JOHANNESSEN



**Fólkaræði og frælsi er ein dýrabærur rættur. Og frælsa orðið hevur størri virði, enn vit dagliga geva gætur. Men frælsið hevur bæði ábyrgd og skyldur við sær. Ábyrgd at røkja tað við skynsemi og skili. Skyldu at traðka til, tá frælsið hjá øðrum er skert**

2. mai skipaði Amnesty í Føroyum fyri sínum parti av alheims tiltakinum at savna inn undirskriftir, ið gera vart við mannarættindastøða í Kina. Eg varð biðin um at halda røðu í sambandi við tiltakið. Fólk savnaðust við sínum grundleggjandi lógartryggjaða rætti at fylkjast. Og vit nýttu høvið at mótmæla, somuleiðis við lógartryggjaðum rætti til talufrælsi.

Hendan sama rættin hava fólk í fleiri londum tíverri ikki. Og júst tað setur krøv til, at vit kenna ábyrgd at brúka okkara rætt at gera vart við tørvandi rættindini hjá øðrum.

Olympisku leikirnir, sum í ár skulu haldast í Kina, geva okkum eitt frálíkt høvi at gera vart við, at fólkinum í Kina tørvar hendan sama rættin at savnast, at mótmæla og at tala. Vit mótmæla ikki olympisku leikunum og harvið heldur ikki teimum túsundtals ítróttarfólkunum, ið hava stríðst og heiðurliga vunnið sær rættin at luttaka á aldargomlu og søguligu ítróttarleikunum, sum í øldir hava verið hildnir í fríðarinnar navni heilt aftur til gomlu grisku mentanina.

Heldur geva ítróttarfólkini og olympisku leikirnir okkum eitt høvi og ein miðil at seta fokus á tørvandi mannarættindi í vertslandinum.

Undir fíggjarlógarviðgerðini í farnu viku gjørdi eg vart við, at eg havi ein dreym. Ein dreym um einar samhaldsfastar og rættvísar Føroyar. Um eitt samfelag við sosialum tryggleika, javnstøðu og arbeiðs- og útbúgvingarmøguleikum fyri øll. Eitt samfelag, har øll verða vird og har øll hava atgongd til arbeiðsmarknaðin og grundleggjandi samfelagstænsturnar. Eitt samfelag við væl útbúnum fólki og einum blómandi og virknum mentanarlívi. Ein samfelag, ið gongur á odda í umhvørvispolitikki og burðardyggari gagnnýtslu av tilfeinginum. Ja, í veruleikanum eitt vælferðarsamfelag, sum liggur á odda ímillum heimsins lond.

Í Kina finnast milliónir av fólki við líknandi dreymi. Men teimum tørvar rættin at bera hann fram. Sum støðan er í dag, ert tú í stórum vanda fyri at verða settur fastur og kanska enntá píndur, um tú ber tíni politisku sjónarmið fram á torg.

Tú og eg hava fullan rætt at leggja afturat okkara dreymi við at nema okkum kunnleika um onnur lond og aðrar skipanir í bókum og bløðum og á alnetinum. Í Kina sleppa fólk bert at lesa tað tilfar, sum stjórnin hevur góðkent, og alnetið er enntá stongt fyri upplýsingum, ið stjórnarvaldinum ikki dámar. Sjálvt teldupostar í Kina verða kannaðir av stóra filtrinum hjá kinversku myndugleikunum. Og tíverri spæla alheims fyritøkur, sum til dømis Google við í hesum ódemokratiska leiki.

Mítt ynski er, at fólkið í Kina fær sama møguleika at fylkjast og at mótmæla, sum tú og eg. At mótmælini saman við Olympisku leikunum fáa ávirkað valdið í Kina til veruliga at virða grundleggjandi mannarættindi, at fólkið fær talufrælsi og rætt til at ogna sær teir upplýsingar, ið tey sjálvi ynskja. Fólkaræði og frælsi er ein dýrabærur rættur. Og frælsa orðið hevur størri virði, enn vit dagliga geva gætur. Men frælsið hevur bæði ábyrgd og skyldur við sær. Ábyrgd at røkja tað við skynsemi og skili. Skyldu at traðka til, tá frælsið hjá øðrum er skert.

# Skipaði viðurskifti – ja takk harra løgmaður

## Viðmerking til útlendingamálið

SONJA J. JÓGVANSDÓTTIR,
samskipari í Samtak



**Broytingarnar í útlendingalógini eru ein vánalig loysn, tí neyðuga arbeiðið er ikki gjørt, hóast ríkilig tíð hevur verið til hetta. Úrslitið kann gerast tann reini ruðuleiki, tí fylgilógir, eftirlit o. a. mangla**

Fyri einum ári síðani kom landsstýrið fram við loysnini um at seta grein 9a í donsku útlendingalógini í gildi. Gjørt var beinanvegin vart við trupulleikarnar í lógini. Fylgilógir mangladu, har var onki eftirlit, útlendingar hava framíhjárættindi til arbeiði, føroyski arbeiðsmarknaðurin er øðrvísi samansettur enn tann danski, og tí er trupult at kopiera lógir umframt at onnur teknisk viðurskifti vóru ógreið.

Atfinningarnar, ið tá vóru førdar fram, eru framvegis viðkomandi, tí løgmaður og flokkur hansara, sum nú fyrisita málið, halda ikki lyftini, ið førd hava verið fram seinastu mánaðirnar.

Ein fylgilóg um setanarbræv er gjørd og eitt arbeiðsloysi mark á 3,5% er ásett í lógina, men hetta er langt frá nóg mikið til at viðurskiftini við útlendskari arbeiðsmegi kunna roknast sum skipaði.

**Skeivt útgangsstøði**
Í Føroyum hava vit seinastu árini havt ein frálíkan møguleika at gera arbeiði ordiligt frá grundini av, nú lógin um útlendska arbeiðsmegi skal broytast. Við at gera tingini røtt frá byrjan kann sleppast undan fleiri av teimum klassisku brotunum á lógir, sáttmálar og faklig rættindi.

Arbeiðsmarknaðirnir í hinum Norðanlondunum hava verið rættiliga opnir í nøkur ár nú, so tað átti at verið sjálvsagt at kaga var eftir lógum, sáttmálum og øðrum viðurskiftum fyri síðani at fáa tí best hugsandi loysnina at galda her á landi.

Men hetta hevur landsstýrið ikki vilja gjørt – ístaðin skulu vit kopiera donsku grein 9a og seta hana í gildi, hóast henda lóg eru gjørd út frá donskum fyritreytum og ikki okkara egnu

**Framíhjárætturin og eftirlit**
Grundleggjandi spurningarnir um framíhjárættindi til arbeiði og eftirlit er ikki loyst. Soleiðis sum lógin sær út í løtuni, so er einki til hindurs fyri, at føroyingar vera sendir til hús og útlendingar fáa arbeiði, tí hesi eru tryggjað 30 tíma arbeiðsviku, meðan føroyingar onga trygd hava.

Løgmaður seg hava fingið vissu frá arbeiðsgevarunum fyri, at nú verður fastlønarsáttmáli gjørdur fyri fiskivinnuna – hetta er bara ikki so. Arbeiðsgevararnir hava sent landsstýrinum eitt bræv, sum sigur, at tey vilja »binda seg til at fara undir eina tilgongd har samráðst verður um fastlønarsáttmála fyri starvsfólk á fiskavirkjum....«

Hetta skriv er eitt ætlanarskriv, sum á ongan hátt bindur nakran part, tí er tað í løtuni ógjørligt at siga, um komið verður nakran veg við hesum arbeiði.

Fakfeløgini eru hørm um, at landsstýrið ikki treytar sær í lógini, at framíhjárættindini til útlendingarnar eru burtur, áðrenn arbeiðsmarknaðurin verður latin upp.

Fakfeløgini høvdu eisini vónað, at landsstýrið gjørdi eitt veruligt eftirlit, umframt at feløgunum var tryggjað nakrar lógligar heimildir, so tey eisini kunna hava eftirlit og fáa arbeiðsfólki innlimað í feløgini. Á henda hátt eru útlendingarnir partur av tryggingunum og fakfeløgini hava møguleika at kanna um røtt løn, eftirløn, frítíðarløn, yvirtíð o.a. verður rindað.

Tað vísir seg í hinum Norðanlondunum, at flestu sáttmálabrotini snúgva seg um, at útlendingar ikki fáa yvirtíð, eftirløn, trygging, frítíðarløn o.t. Hetta kunna vit í Føroyum fyribyrgja við einum góðum eftirliti.

**Góða loysnin**
Hvat er so ein góð loysn í spurninginum um útlendska arbeiðsmegi? - Ein góð loysn er ein loysn við skipaðum viðurskiftum. Ein góð loysn er ein loysn, sum er rímuliga løtt at fyrisita. Ein góð loysn er ein loysn sum hevur gott eftirlit.

Ein góð loysn inniheldur eisini neyðugu fylgilógir og annað, so sum tilboð um málundirvísing til teir útlendingar, sum koma hendavegin umframt víðfevnda kunning um hetta land, og hvøri rættindi útlendingarnir hava.

Ein góð loysn setur ikki føroyska arbeiðsmegi til viks fyri útlendskari arbeiðsmegi.

Tað hevði borið til – um vilji var til tess – at sett nakrar fyritreytir sum grund fyri lóggávuarbeiðnum og síðani gjørt lógarsmíði út frá hesum fyritreytum. Men nei, landsstýrið heldur rimmar fast um grein 9a. Tað syrgiliga er, at tað er ikki so nógv sum skal til uttan vit og skil og ein vilji at loysa málið.

Løgið, sum veruleikin hjá flokki løgmans er so nógv øðrvísi nú 3 mánaðir eftir valið í mun til undan valinum. Løgmaður gav nøkur ítøkilig lyfti um skipaði viðurskifti á arbeiðsmarknaðinum – enn sita fakfeløgini spent og bíða.

# Til Kringvarp Føroya

KRISTIN MICHELSEN
borgarstjóri



Jeg vil takka Kringvarp Føroya fyri teirra stóra áhugað í samband við 100 ára haldið hjá Tvøroyrar kirkju.

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!